**Viðvíkjandi umsitingini av studninginum frá Kulturkontakt Nord til at týða føroyskar bøkur til onnur Norðurlendsk mál**

Skipanin er ein trý ára royndarskipan og virkar soleiðis, at umsitingin av upphæddunum er national. Tað vil siga, at hvørt landið sær fær ávísa upphædd at bjóða út. Tey smáu londini fáa positiva serviðferð á tann hátt, at tey fáa ein uppá seg størri procentpart av samlaðu játtanini og eisini soleiðis, at tey hava møguleika fyri at lata stuðul til framleiðslukostnaðin. Søkjast skal altíð í upprunalandinum hjá verkinum, altso úr Føroyum fæst bert stuðul til at umseta *úr* føroyskum ikki *til* føroyskt.

Í 2008 var føroyski parturin av játtanini 209.000 kr. umframt 25.000 kr. til umsiting av játtanini.

Trettan umsóknir vóru í 2008, tað sá soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Jóanes Nielsen | Glansbílætasamlararnir/ danskt | 60.000 kr. til týðing |
| ” | ” | 18.000 kr. til framleiðslu |
| Marianna Debes | Úti á leysum oyggjum/danskt | 26.343 kr. til týðing |
| Oddvør Johansen | Í morgin er aftur ein dagur/norskt | 42.011 kr. til týðing |
| ” | ” | 40.000 kr. til framleiðslu |
| Sólrun Michelsen | Tema við slankum/danskt | 21.000 kr. til týðing |
| Gunnar Hoydal | Dalurin fagri/danskt | 18.000 kr. til framleiðslu |
| Rakel Helmsdal | Tey kalla meg bara Hugo/norskt | 35.030 kr. til týðing |
| ” | ” | 25.000 kr. til framleiðslu |
| Bárður Oskarsson | Ein hundur ein ketta og ein mús/danskt | 12.000 kr. til framleiðslu |
| Bárður Oskarsson | Beinið /danskt | 12,000 kr. til framleiðslu |
| Bárður Oskarsson | Pól hin kuli giraffurin/danskt | 12.000 kr. til framleiðslu |
| Carl Johan Jensen | September í bjørkum…/danskt. Plus CD. | 26.000 kr. til framleiðslu |

Tað skilst av hesum, at í 2008 var hendan skipanin sera góð fyri Føroyar. Tað sæst eisini av hesum, at møguleikin fyri at lata studning til framleiðslu er altavgerandi. Sannroynd er, at tað er ikki lætt at fáa forløgini í øðrum londum at taka føroyskar bøkur til útgávu, tí tær seljkast bara í sera avmarkaðum tali, men tá mestiparturin av framleiðslukostnaðinum fylgir við, gongur tað sjálvandi nógv léttari.

Fleiri av bókunum, sum via hesa skipan eru útkomnar á donskum, hava fingið sera góð ummæli í donsku dagbløðunum.

Nú eru vit so farin undir seinasta árið í royndarskipanini. Føroyska umboðið hevur verið við til at eftirmeta royndartíðina, møguliga verður royndartíðin longd nakað, men væntandi er, at ein endalið skipan kemur, sum fer at líkjast royndarskipanini rættiliga nógv.

Guðrun Gaard